## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði og ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin gul av norði ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig. Seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi og regn. Lýggjari.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur. Hitin um 6 stig. Týsdagin hækkar hann upp í norðan og ælingur, partvís vátaslettingur. Nakað kaldari.

# Gallan í jólahýri

**Restaurant Gallan, sum er heitið á matstovuni hjá Sjómansheiminum í Havn, bjóðar viðskiftafólkunum bæði klassiskan jólamat og meira forkunnugar rættir á jólabuffettini í ár**



*Restaurant Gallan bjóðar viðskiftafólkum sínum allan frá seinast í november mánaði og allan desember mánað eina leskiliga jólabuffet*

Matstovan á Sjómansheiminum í Havn, Restaurant Gallan, hevur í ár brynjað seg til jóla við eini fjølbroyttari og leskiligari jólabuffet. Kokkarnir á Galluni bjóðað viðskiftafólkunum bæði heitan og kaldan mat frá seinast í november mánaði og allan jólamánaðin.

Á matarskránni hjá Galluni er bæði rúm fyri klassiskum jólamati og meira forkunnugum rættum. Av forkunnugum rættum kunnu nevnast øða, krabbi, kræklingur, roykt svartkalvi, turrur fiskur og grind, meðan tað eisini er pláss á buffettini fyri dunnu, fleskasteik við reyðkáli, brúnkaðum eplum og rís a la mande.

Jólabuffettin fer at kosta millum 150–160 krónur. Tað er pláss fyri 64 fólkum á Restaurant Galluni á Sjómansheiminum. Hjá barnafamiljum er Restaurant Gallan ein funnin fressur, tí afturat leskiligari og fjølbroyttari jólabuffet er eisini pláss sett av til børnini at spæla í einum spælirúmi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷6 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | – |
| Ammassalik | – |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 10 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷4 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | ÷11 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷7 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 6 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 12 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1005 hPa. vestan fyri Skotland kemur móti Føroyum. Eitt annað lágtrýst, 997 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og grynnist.




Lágtrýstið við Føroyar fer eystureftir og gevur eitt skifti høgætt við Føroyar. Hátrýstið yvir Atlantshavinum stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Grønlands verður væntandi yvir Føroyum sunnudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/11 kl. 06⁰⁰-25/11. 06 ⁰⁰. Hitin í gjár: 8,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,8 mm – mált frá 24/11 kl. 06 ⁰⁰-25/11 kl. 06 ⁰⁰
Avfallið higartil í november: 147,9 mm

## ÚF Morgunlestrar

**29. novemb.-4. desemb.**

***Uni Næs, prestur, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 29. november:**
nr. 82 Ver vælkomið, Harrans ár
nr. 69 Jesus, kom og ver hjá mær

**Týsdagin 30. november:**
nr. 89 Byrja nú við trúgv og treysti
nr. 72 Jesus, leið meg allan aldur

**Mikudagin 1. desember:**
nr. 87 Eitt er Harrans ár nú runnið
nr. 88 Statt upp úr svøvni, tú ið svevur

**Hósdagin 2. desember:**
nr. 86 Ger beinar Harrans leiðir
nr. 407 Jesus góði, ver tú mín

**Fríggjadagin 3. desember:**
nr. 83 Sum ein føgur rósulund

**Leygardagin 4. desember:**
nr. 84 Lat hurðar upp, ger borglið breið
nr. 34 Hvørt eitt ljós á lívsins nátt

ÚF

*Sunnudagur kl. 14.15*

### Burtur í haga

Í sendingini fara vit burtur í haga við røktingarmonnunum Niclas Joensen og Tummas Marna Joensen í Kvívík. Teir fara at greiða frá, hvussu teir røkta stóra ognarhagan hjá kvívíkingum.

*Hósdagur kl. 19.00*

### Tilvera: Timburmaðurin úr Nazareth

Samrøða við Martin Joensen. Hann sigur frá, hvussu hann var loystur bæði frá rúsdrekka og tubakki. Hansara trúgv gjødist alsamt meiri livandi og í øllum sá hann, at nakað var til, sum var størri enn hann. Martin gjørdist illa sjúkur av krabbameini, sum nú er horvið, men í øllum – sorg sum gleði – fylgist Martin nú við Timburmanninum úr Nazaret.

## VESTFALLSKYRRINDI

26. november: Fullmáni
30. november: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. nov | 05.50 | 18.12 | 04.50 | 17.12 | 05.05 | 17.27 | 07.50 | 20.12 | 08.50 | 21.12 | 04.05 | 16.27 | 03.05 | 15.27 | 06.05 | 18.27 | 07.05 | 19.27 | 05.35 | 17.57 | 06.50 | 19.12 |
| 27. nov | 06.35 | 18.59 | 05.35 | 17.59 | 05.50 | 18.14 | 08.35 | 20.59 | 09.35 | 21.59 | 04.50 | 17.14 | 03.50 | 16.14 | 06.50 | 19.14 | 07.50 | 20.14 | 06.20 | 18.44 | 07.35 | 19.59 |
| 28. nov | 07.23 | 19.48 | 06.23 | 18.48 | 06.38 | 19.03 | 09.23 | 21.48 | 10.23 | 22.48 | 05.38 | 18.03 | 04.38 | 17.03 | 07.38 | 20.03 | 08.38 | 21.03 | 07.08 | 19.33 | 08.23 | 20.48 |
| 29. des | 08.36 | 20.56 | 07.36 | 19.56 | 07.51 | 20.11 | 10.36 | 22.56 | 11.36 | 23.56 | 06.51 | 19.11 | 05.51 | 18.11 | 08.51 | 21.11 | 09.51 | 22.11 | 08.21 | 20.41 | 09.36 | 21.56 |

5 707265 100050 >